## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men seinnapartin lækkar hann niður í sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av ymsum ættum og ælingur, týsdagin upp í strúk í vindi av útsynningi og regn. Hitin millum 14 og 18 stig.

## DAGSINS FERÐAFÓLK

# "Føroyar eru eisini ein partur av verðini"

**Tvørámanninum Paula Einarsson dámar væl fótbólt. Hann er til hvønn einasta dyst hjá TB, og væntar at Frakland gerst heimsmeistari í fótbólti. Annars er hann stjóri í Oil Spill Response í Føroyum og býráðslimur á Tvøroyri.**

*Snorri Brend*



*- Stórar avbjóðingar standa fyri framman, tá talan er um oljuvinnuna í føroyskum øki, sigur Pauli Einarsson*

**Fert tú uttanlands í summar?**
- Nei, ikki í ár. Møguliga fara vit onkran stuttan túr í Føroyum. Í summar fari eg at takast við ymiskt arbeiði heima við hús.

**Leygardagin kemur ein oljuboripallur til Føroyar. Hvat er hetta tekin um?**
- Hetta er eitt sera áhugavert stig. Hetta vísir, at áhugin fyri okkara øki er aftur vorðin stórur, og at tey stóru oljufeløgini hava vónir um at finna olju her.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
- Mær dámar væl at spæla guittara, men tað er bert til húsbrúks. Eg hevði kortini ikki væntað, at alt Føroya fólk skuldi fáa hetta at vita gjøgnum Sjónvarp Føroya (he-he). Annars eri eg saman við familju og vinum.

**Hvør verður heimsmeistari í fótbólti?**
- Tað er ringt at siga, men eg vænti at Frakland vinnur á Italien. Teir eru meiri skipaðir nú enn tá kappingin byrjaði. Tí vinna teir sunnudagin.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**
- Familju, vinum og kenningum. Og so vil eg eisini ynskja Statoil-samtakinum góða eydnu við oljuboringini í summar. Eg vóni at alt gongur sum tað skal – og uttan nakað óhapp!

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 28 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 31 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 25 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 32 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer í landnyrðing og brúgvalagið eystan fyri Føroyar hvørvur eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/7 kl. $06^{00}$– 5/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í apríl: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0 mm – mált frá 4/7 kl. $06^{00}$– 5/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 12 mm

Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

GEVIÐ BLÓÐ

## VESTFALLSKYRRINDI

4. juli Jørðin longst frá sólini
11. juli Fullmáni
13. juli Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Juli | 03.25 | 15.45 | 02.25 | 14.45 | 02.40 | 15.00 | 05.25 | 17.45 | 06.25 | 18.45 | 01.40 | 14.00 | 00.40 | 13.00 | 03.40 | 16.00 | 04.40 | 17.00 | 03.10 | 15.30 | 04.25 | 16.45 |
| 7. Juli | 04.06 | 16.29 | 03.06 | 15.29 | 03.21 | 15.44 | 06.06 | 18.29 | 07.06 | 19.29 | 02.21 | 14.44 | 01.21 | 13.44 | 04.21 | 16.44 | 05.21 | 17.44 | 03.51 | 16.14 | 05.06 | 17.29 |
| 8. Juli | 04.52 | 17.19 | 03.52 | 16.19 | 04.07 | 16.34 | 06.52 | 19.19 | 07.52 | 20.19 | 03.07 | 15.34 | 02.07 | 14.34 | 05.07 | 17.34 | 06.07 | 18.34 | 04.37 | 17.04 | 05.52 | 18.19 |
| 9. Juli | 05.46 | 18.13 | 04.46 | 17.13 | 05.01 | 17.28 | 07.46 | 20.13 | 08.46 | 21.13 | 04.01 | 16.28 | 03.01 | 15.28 | 06.01 | 18.28 | 07.01 | 19.28 | 05.31 | 17.58 | 06.46 | 19.13 |
| 10. Juli | 06.37 | 19.05 | 05.37 | 18.05 | 05.52 | 18.20 | 08.37 | 21.05 | 09.37 | 22.05 | 04.52 | 17.20 | 03.52 | 16.20 | 06.52 | 19.20 | 07.52 | 20.20 | 06.22 | 18.50 | 07.37 | 20.05 |

5 707265 100050 >